# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Dýrtíð

Løntakarafeløgini eru nú farin at gera vart við seg í sambandi við príshækkingarnar. Samtak vísir á, at brúkaraprístalið fyri annan ársfjórðing í ár er komið upp á 116,4. Hagstovan upplýsir, at tað framvegis er prísvøksturin á brennievni og matvørum, sum elvir til hækkað prístal. Prísurin á brenniolju til húsarhald er hækkaður 20,2% , og allir matvørubólkar eru dýrkaðir henda ársfjórðingin. Samanlagt eru matvøruprísirnir í handlum farnir 2,1% upp, móti prísunum fyrsta ársfjórðingi, har vøksturin var 1,3 %. Sostatt nærkast vit eini støðu, sum skjótt kann allýsast sum dýrtíð. Tað hevur gjøgnum seinastu hundrað árini verið politisk siðvenja at seta í verk tiltøk til tess at verja tey lægstløntu og pensjonistar móti avleiðingum av dýrtíð. Eitt vælkent dømi um hendan politikk er prístalsreguleringin av tímalønum og starvsmannalønum, sum kom í gildi undir øðrum heimsbardaga. Hendan skipan var í sjeytiárunum avtikin av samgonguni millum Javnaðarflokkin, Fólkaflokkin og Tjóðveldi við tí grundgeving, at hon var darvandi fyri vinnuna. Eitt annað tiltak frá tí skeiðinum er oljugjaldið, ið kom sum eitt úrslit av oljukreppuni í 1973. Upprunaliga var ætlanin, at inntøkurnar frá hesum gjaldi skuldu fara í grunn til fígging av alternativum orkukeldum, men hetta gjald endaði í landskassanum og er síðan farið til rakstur.

Einhvør demokratisk stjórn hevur ábyrgd av vælferðini hjá øllum sínum borgarum og um okkara leiðir átekur einhvør stjórn sær hesa ábyrgd. Eitt fólkavalt stýri kann ikki loyva sær at sita hendur í favn, meðan dýrtíð máar støðið undan vælferðini hjá stórum pørtum av borgarunum. Í Danmark t.d. hevur stjórin í sambandi við eina endurskoðan av skatta- og avgjaldskipanini greitt meldað út, at tær sterkastu herðarnar skulu bera tær tyngstu byrðarnar. Hetta er eitt alment viðurkent vælferðarprincipp, sum sjálvt ein erkaliberal stjórn sum tann danska tekur undir við. Tað er tí ein spurningur, hvussu leingi okkara stjórn kann loyva sær at venda blinda eygað til teir trupulleikar, sum standast av dýrtíðini. Hetta er eitt øki, sum í hvussu so er ikki kann latast til frælsu marknaðarkreftirnar at greiða. Dýrtíðin kann skjótt gerast ein álvarsamur politiskur trupulleiki hjá landsstýrissamgonguni. Vit nærkast eini støðu, hvar fakfeløgini fara at krevja nýggjar lønarsamráðingar, ja, eitt hitt størsta felagið hevur longu signalerað nýggj lønarkrøv. Hetta merkir ófrið á arbeiðsmarknaðinum, nakað ið bert kann koma illa við hjá vinnuni. Samtak kemur við nøkrum vælmeintum ráðum til landsins myndugleikar. Mælt verður til, at lække MVG á matvørum og at avtaka oljugjaldið. Eisini verður mælt til at gera nakað við skattastigan fyri lønir omanfyri 400.000 kr. Hetta eru vælmeint og áhugaverd uppskot, sum samgongan eigur at umhugsa í størsta álvara

**Sosialurin**

## Rúmligur arbeiðsmarknaður

Allir borgarar í Føroyum eiga at hava somu rættindi til at virka á arbeiðsmarknaðinum. Eingin eigur at vera útihýstur vegna skerdan førleika ella brek. Arbeiðsmarknaðurin eigur at vera háttaður soleiðis, at til ber at fáa tey í starv, sum ein ynskir. Tey starvsfólk, sum í styttri tíð gerast óarbeiðsfør, eiga at varðveita tilknýtið til arbeiðsmarknaðin.

Hetta er nakað av tí, sum Ráðið fyri brekað metir vera sera umráðandi, til tess at Føroyar kunnu kalla seg eitt framkomið og vælvirkandi samfelag. Okkum tørvar leiðreglur á arbeiðsplássum, soleiðis at bæði arbeiðsgevari og arbeiðstakari vita, hvat tey skulu gera, tá arbeiðstakarar vegna sjúku ella brek ikki eru førir fyri at røkja arbeiðið fult út í styttri ella longri tíð.

**Tað privata frammanfyri**

Á privata arbeiðsmarknaðinum hava partarnir longu gjørt eitt protokollat um rúmliga arbeiðsmarknaðin. Hesar ásetingar eru nakað leysar í orðingunum, tó at tær eru tekin frá arbeiðsgevara og arbeiðstakara um at lata upp, soleiðis at øll kunnu bjóða sína arbeiðsmegi fram, og øll fáa møguleika fyri at koma í starv, har hetta er í boði. Arbeiðið at gera ásetingarnar meiri ítøkiligar er farið í gongd, og tað er at fegnast um.

**Leiðreglur til tað almenna**

Á almenna arbeiðsmarknaðinum finnast ongar ásetingar um rúmliga arbeiðsmarknaðin enn. Vit vita, at tað eru fólk við viðkomandi førleikum, sum ikki halda seg til, tí arbeiðsplássini ikki eru innrættað til teirra. Tað kunnu vera trappur, innrætting, arbeiðstíðir o. a., sum forða fólki við skerdum førleika at virka á sama grundarlagi sum onnur. Tað almenna eigur sum skjótast at lata arbeiðsmarknaðin upp fyri fólki við skerdum førleika. Øll vilja geva sítt íkast til samfelagið og vera partur av einum livandi felagsskapi.

**Starv.fo**

Á starv.fo kunnu øll skráseta seg og fáa vegleiðing um størv – eisini fólk við skerdum førleika. Skipanin verður umsitin av ALS. Hettar fegnast Ráðið fyri brekað stórliga um. Um dagarnar er nýggi portalurin arbeidi. fo eisini komin, har arbeiðstakarar eisini kunnu skráseta seg.

**Øll kunnu gera okkurt**

Brúk er fyri øllum hondum á arbeiðsmarknaðinum. Tey, sum hava mist tilknýtið til arbeiðsmarknaðin, ella als ikki hava verið á arbeiðsmarknaðinum, eiga, í tann mun tað ber til, at fáa møguleikan at arbeiða. Men tað eru ikki einans reglur, ið mangla. Hugburður hevur sera nógv at siga eisini og ein jaligur hugburður bæði hjá teimum, sum hava skerdan førleika, og hjá arbeiðsplássum kann gera, at vit koma langt ávegis.

**Ráðið fyri brekað**

### Fakta:

Ráðið fyri brekað vísir til landsstýrismannin í almanna- og heilsumálum

Forkvinna er Barbara á Tjaldrafløtti
Marjun S. Olsen, Vestmanna, umboðar Føroya kommunufelag
Steinbjørn Jacobsen, Klaksvík, umboðar Kommunusamskipan Føroya
Uni Rasmussen, Søldarfjørður, umboðar MBF
Leila Solmunde, Fuglafjørður, er sum formaður í MBF limur í ráðnum
Kristianna Sjóvará umboðar Løgmansskrivstovuna
Jan Simonsen umboðar Almanna- og heilsumálaráðið
Hallbera F. West frá Almanna- og heilsumálaráðnum er skrivari í Ráðnum fyri brekað

Ráðið fyri brekað er ráðgevandi í málum viðvíkjandi brekaðum.

Ráðið fyri brekað skal:
geva landsstýrinum ráð í øllum almennum málum, sum hava týdning fyri viðurskiftini hjá brekaðum í Føroyum, og geva øðrum almennum myndugleikum ráð í málum, sum nema við livikor teirra brekaðu við atliti til at tryggja, at tað verður víst umhugsni til brekað í allari samfelagsráðlegging av sínum eintingum seta fram uppskot til fremjan ella broytingar innan umrøddu øki og
fylgja við og meta um viðurskiftini hjá brekaðum fólki í Føroyum, eisini tá um fyribyrging ræður.

## Er hetta prísurin fyri loysing???

ANN MIKKELSEN

Eg sum avvarðandi hjá sklerosuraktum eri milt sagt í sjokk, hvat hugsa tit fyri tykkum, høgtvirdu?? menn og kvinnur í løgtingi og í landsstýri??

Liva vit í ár 2008?

Liva vit í einum framkomnum Føroyum?

Vit, sum hava sklerosu tætt at lívinum, vita, hvat sjúkan kann gera við likamið, vit vita eisini hvat undur heilivágurin kann gera og vit vita so sanniliga, hvat hann kostar, og tað er ikki lítið.

Er tað virkuliga meiningin, at allir føroyingar, sum raktir eru av sklerosu, har heilivágurin virkar, skulu flyta av landinum, fyri at fáa hjálp?? og teir, sum ikki hava orku at flyta, bara hava eitt at síggja fram til: Ein rullistól og óhjálpni???

Hvat kostaði Uttanríkisráðið hjá Høgna??

Hvat kostaði Lógarmálaráðið hjá Helenu??

Nei, eg bara spyrji. Vit, sum avvarðandi, standa bangin og rista í okkara grundvølli.

Og hvar er løgmaður í øllum hesum ørskapi??

Er hetta prísurin fyri loysingina, so var betur um hendan samgongan takkar av og leggur kongin, tí, um vit reka væl virkandi familjur við børnum av landinum, ja, so verða Føroyar eitt sera fátækt land og eitt ógvuliga ólukkuligt fólk.

Haldi erlig talt, at nú má onkur?? skera ígjøgnum og steðga ørskapinum. Vit hava ikki ráð at missa meiri ungfólk/familjur.

Minnist til, at sum tit laða tykkara varðar, verða tit mintir.

Hava vit ráð til 3 sjúkrahús???

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Tróndur Skaalum trondur@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hogni@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Dorit Hansen dorit@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydnaskaale@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Niels Petersen niels@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan $13^{30}$

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.